Ársfrágreiðing 2012 Felagið Peningastovnar

Endamál og virkisøki hjá Felagnum Peningastovnar

Endamálið hjá Felagnum Peningastovnar er at virka fyri góðum umstøðum hjá føroyskum peningastovnum og fremja áhugamál limanna mótvegis landsstýri, øðrum almennum myndugleikum og áhugafelagsskapum.
Peningastovnarnir hava stóra ávirkan á gongdina í samfelagnum, har ein tann týdningarmesta uppgávan hjá teimum er, at umsita gjaldførið í samfelagnum. Tað verið seg at umsita privata- og vinnuliga uppsparing, ið verður lánt útaftur til privatpersónar og vinnuna, tá teimum tørvar gjaldførið til eitt hvørt endamál. Við ársultimo 2012 var talið av starvsfólkum í teimum føroysku peningastovnunum 757 starvsfólk. Talan er sostatt um eina stóra vinnugrein í føroyskum høpi.
Limirnir í Felagnum Peningastovnar eru teir fýra føroysku peningastovnarnir, og tað er eitt aðalmál hjá Felagnum Peningastovnar at arbeiða fyri, at peningastovnarnir í Føroyum hava so góðar karmar at arbeiða undir sum gjørligt.
Felagið Peningastovnar eygleiðir politiska arbeiðið tí avgerðirnar kunnu hava stóra ávirkan á virkisgrundarlagið hjá peningastovnunum í Føroyum. Tí er stórur partur av arbeiðinum vendir ímóti landsstýrinum, løgtinginum og fyrisitingini.

Nevndin í Felagnum Peningastovnar er mannað soleiðis:

Súni Schwartz Jacobsen,	Formaður, forstjóri í Eik Banka
Janus Petersen, næstformaður	Forstjóri í Banknordik
Marner Mortensen	Stjóri í Norðoya Sparikassa
Søren Bruhn	Stjóri í Suðuroyar Sparikassa

Skrivstova: Vinnuhúsið, Gordon Rajani

Stutt um tær vinnuligu áskoðanirnar í 2012:

Vinnuligan fiskiskap

Peningastovnarnir hava víst á, at neyðugt er at taka avmarkingarnar úr fiskivinnulóggávuni, soleiðis at vinnan fær fríari ræsir at tillaga sítt virksemi. Somuleiðis hava peningastovnarnir víst á, at 2018 trupulleikin framvegis avmarkar møguleikarnar hjá vinnuni í at fáa fígging.

Alilóggávan

Peningastovnarnir hava víst á, at tað var skeivt at avmarka útlendskan kapital í alivinnuni. Við eigaraavmarkingini framdi løgtingið keyparaavmarking og sæð út frá einum búskaparligum sjónarmiði er tað fatanin hjá Felagnum Peningastovnar, at karmarnir hjá alivinnuni eins og fiskivinnuni eiga at verða frælsir. Hetta gevur vinnuni bestu fortreytir fyri at fáa ein skilagóðan rakstur.

Almennu grunnar

Peningastovnarnir hava víst á, at tað er kappingaravlagandi, at fleiri almennir grunnar, hvørt innskotspeningur kemur frá skattgjaldarunum, lána pening út í kapping við peningastovnarnar. Fleiri av teimum rinda hvørki lønarhæddaravgjald, skatt og hava heldur einki avkastkrav. Hartil skal sigast, at teir als ikki virka undir somu strongu eftirlti sum peningastovnarnir virka undir. Hetta skeiklar sjálvandi kappingina.

Lønarhæddaravgjald

Peningastovnarnir hava vístá, at hóast Fíggjareftirlitið alment hevur heit á peningastovnar um at økja um roknskaparliga avlopið, so hevur løgtingið samtykt at økja enn einaferð um rakstrarkostnaðin hjá føroysku peningastovninum við at økja um lønarhæddaravgjaldið sum er ein skattur á løn. Lønarhæddaravgjaldið í Føroyum er heimsins hægsta. Fyri nov. 2009 var lønarhæddaravgjaldi 5%, meðan tað í dag er 12%. Gjaldið er økt við 140% í tíðarskeiðnum 2009 til 2013. Peningastovnarnir tillaga sjálvsagt sítt virksemi til hendan nýggja veruleika, tá starvsfólkasamanseting skal metast um.

Seinast lønarhæddaravgjaldið varð hækkað, grundgav Fíggjarmálaráðið (undrunarsamt) hækkingina við útláns rentuhækkingum frá peningastovnum. Peningastovnarnir hava í 2013 lækkað um útlánsrenturnar munandi, og vænta tískil at lønarhæddaravgjaldi eisini fer at lækka.

Fyritøkuveð

Peningastovnarnir hava í fleiri ár vístá, at tørvur er á lóg um fyritøkuveð í Føroyum. Um hendan lóggáva varð innført í Føroyum hevði tað verið lagaligari hjá føroyskar vinnu at fingið fígging. Hóast hetta málið varð reist í 2008 hjá myndugleikum og politikkarum og seinni varð góðkent á landsstýrisfundi, er tíverri einki konkret hent í málinum frá landsins síðu.

Landsbankin

Peningastovnarnir hava fört fram, at tær vanligu tjóðbankauppgávurnar so sum gjald-, penga-, og rentupolitikkur verður framdur vegna Føroyar av danska tjóðbankanum. Tí hevur Landsbanki Føroya sum tjóðbanki ongan leiklut, og gevur tað onga meining at tosa um ein slíkan stovn í Føroyum. Peningastovnarnir tóku tískil undir við at avtaka landsbankan.

Talgilda undirskrift

Peningastovnarnir hava vístá, at tørvur er á eini talgildari undirskrift í Føroyum. Hetta vildi ment KT infrakervið í Føroyum til gangs fyri borgarar, vinnulívið og tann almenna geiran. Møguleikar vildi við eini talgildari undirskrift at framt munandi sparingar í vinnuliga og almenna geiranum. Peningastovnarnir bjóðaði í tí sambandi í januar 2012 seg til at rinda helmingin av eini slíkari loysn móti at landi rindaði hina helvtina. Peningastovnarnir hava eisini bjóðað seg til at seta loysnina í verk. Tíverri hava almennu myndugleikarnir ikki svarað peningastovninum um áhugið er fyri hesi loysn, og tykist málið tíverri ikki aktuelt longur.

Gongdin hjá føroysku peningastovnunum

Búskapargongdin

Peningastovnarnir meta um útlitini, at tann búskaparliga gongdin í 2013 verður nakað betur enn í 2012. Føroyski búskapurin er grundleggjandi væl fyri, m.a. tí at almenni geirin og húsarhaldini hava lutfalsliga lága skuld. Útflutningurin er øktur við bert øktur við 1,7% í tíðarskeiðinum 2011 til 2012.
Innflutnigurin er øktur við 26% grunda á innflutning av skipum til frálandavinnu, øktan oljuprís v.m. Hetta hevur sostatt neiliga ávirkan á gjaldsjavnan. Eingin tøl eru enn tøk fyri bruttotjóðarúrtøkuna fyri 2012 frá Hagstovu Føroya.

Raksturin hjá peningastovnum

Peningastovnarnir høvdu ikki eitt nøktandi ársúrslit í 2012, sæð í mun til renting av eginognini. Hóast hetta, so var avlopið fyri allan peningastovnsgeiran 160 mió. kr. Hetta er fyrstu ferð síðani 2008, at peningastovnsgeirin í Føroyum tilsamans hevur eitt positivt ársúrslit.

Øktar rakstrarútreiðslur

Peningastovnarnir eru framvegis harmir um, at Løgtingið enn einaferð samtykti at hækka lønarhæddaravgjaldið. Hesu ferð frá 10% til 12% við gildiskomu frá 2013. Hetta hevur fört við sær, at kappingarfortreytirnar gjørdust enn verri. Henda eykaútreiðsla verður partvíst flutt yvir á kundan samstundis sum starvsfólkatalið er lækkað. Lønarhæddaravgjaldið skal síggjast í mun til, at peningastovnarnir frammanundan rinda partafelagskatt, netto mvg, A-skatt av lønum umframt eru viðvirkandi til, at landið fær nógv inn í tinglýsingargjøldum.

DKK 1.000	2005	2006	2007	2008	2009	2010	2011	2012
Lønarhæddaravgjald	12.633	13.648	15.390	17.112	16.585	32.35.	34.571	34.631
Broyting		1015	1742	1722	-527	15770	2216	60

Kelda: www.gjaldstovan.fo, Landsroknskapir 2005-2012

Mett verður, at samlaða lønarhæddaravgjaldið í 2013 verður 40 mió. kr.

Talið av starvsfólkum ultimo eru økt við 4,7% í tíðarskeiðinum 2011 til 2012, meðan útreiðslurnar til starvsfólk eru øktar við 6,4%. Útreiðslurnar til fyrisiting eru falnar við 14,5% í sama tíðarskeiði. Starvsfólkatalið væntast væl lægri í 2013 vegna uppsøgnir, sum eru framdar í 2012/2013. Orsøkin til fyrisitingarfallið kemst í størstan mun av effektiviseringum.

Teir føroysku peningastovnarnir	2008	2009	2010	2011	2012	Munur
Starvsfólkatal (ultimo)	503	499	623	723	757	4,77%
Starvsfólkaútreiðslur (mió. kr.)	246	245	332	444	472	6,44%
Aðrar fyrisitingarútreiðslur (mió. kr.)	222	218	312	421	360	-14,51%
Í alt (mió. kr.)	468	463	644	864	832	-3,75%
Starvsfólka,- og fyristingarútreiðslur/starvsfólk	0,93	0,93	1,03	1,20	1,10	-8,14%

Kelda: Ársroknskapir

Rentan

Rentustøðið er lækkað í 2012 í mun til 2011. Orsøkin til lækkingarnar í rentustøðinum er vánalig búskaparlig útlit. Roknað verður við, at rentan verður á sama støði í 2013.

Danmark, ultimo árið	2002	2003	2004	2005	2006	2007	2008	2009	2010	2011	2012
Danmarks Nationalbank - útlán (%)	2,95	2,15	2,15	2,4	3,75	4,25	3,75	1,2	1,05	0,7	0,2

Kelda: Nationalbanken.dk

Út,- og innlán

Innlánini eru økt við 0,1 mió. kr. í 2012, meðan útlánini eru fallin við 0,7 mió. kr.

Teir føroysku peningastovnarnir	2008	2009	2010	2011	2012
Innlán	14,4	14,5	17,6	21,5	21,6
Útlán	18,1	17,3	18,9	18,8	18,1

Ultimo des. DK íroknað

Kelda: Ársroknskapir

Mett verður, at útlánini hjá peningastovnunum fara at vaksa nakað í 2013. Útlánsnøgdin hevur síðani 2008 ikki broytt seg nógv í tali, hóast stórar niðurskrivingar tey seinnu árini í Eik Banki. Niðurskriving upp á útlán gongur í stóran mun upp við øktum útlánum í sambandi við at BankNordik hevur keypt virkir upp.

	2006	2007	2008	2009	2010	2011	2012
Áheitanir um trotabúðarviðgerð	3319	3331	2747	4038	2993	2975	1954
Harav útpanting	1828	2109	1113	1677	395	1363	716
Tvingsilssølur av fastari ogn		6	7	13	12	16	33

Kelda: Føroya Rættur

Áheitanir um trotabúgvsviðgerð ella innheinting umvegis fútarættin fall í 2012 við 1.021 stk. Í 1.954 førum gjørdust teir handlandi annaðhvørt samdir, gjørdu eina gjaldsavtalu ella rætturin ein úrskurð.
Í 716 førum var ein niðurstøða tikin av fútarættinum, t.d. tikið pant í ognum. Hetta tal er væl lægri í 2012 í mun til í 2011. Sostatt bendir nakað á, at tað er vorðið nemmari at gera semjur millum partar, ið eru vorðnir ósamdir. Talið av tvingsilssølum av fastari ogn vaks eisini lutfalsliga nógv í 2012 í mun til 2011.